*BP Amoco, eitt av heimsins størstu oljufeløgum, letur upp skrivstovu 18. apríl:*

# Sær stórar møguleikar á føroyska landgrunninum

*-Møguleikar eru góðir fyri at finna oljufelt við Føroyar, sum eru á stødd við Foinaven og Schiehallion, og BP Amoco heldur seg hava bæði neyðugu royndirnar og vitanina til at finna slík felt sigur leitingarstjórin hjá felagnum, Brian Mitchener, sum júst hevur verið í Føroyum saman við 8 øðrum fólkum frá felagnum at gera neyðugu fyrireikingarnar til 1. útbjóðing*



*Brian Mitchener, leitingarstjóri hjá BP Amoco á Atlantsmótinum og eisini fyri Føroyaøkinum her saman við føroyska umboðsmanninum hjá felagnum, Hjarnar Djurhuus. Aftanfyri teir báðar sæst bygningurin, har BP Amoco letur upp skrivstovu 18. apríl. Mynd Jan*

JAN MÜLLER

Tað skuldu ikki færri enn tríggjar flogferðir til Føroya, fyrr enn tað eydnaðist „Føroyabólkinum" hjá einum av heimsins størstu oljufeløgum, BP Amoco, at fáa fast undir fótum á klettunum úti í Atlantshavi. Tvær ferðir hevur eitt stórt ferðalag frá BP Amoco roynt at lent í Føroyum við bretskum leiguflogfari. Báðar ferðir vórðu oljufólkini noydd til at venda aftur vegna vánaligum veðurlíkindum. Ikki fyrr enn triðju ferð, tá oljufólkini valdu heldur at fara við rutuflogfarinum hjá Atlantsflog bar til. BP-fólkini máttu sanna tað, sum eisini er lagt upp til við oljuvirkseminum í Føroyum, at føroyskar vørur og tænastur eiga at verða brúktar, um hesar eru kappingarførar. Brian Mitchener, leitingarstjóri í BP Amoco fyri Føroyaøkið er heldur ikki í iva longur. Orsøkin til at teir komu til Føroya sum ætlað var tann, at teir brúktu føroyska flogfarið.

### Klárir

Ikki færri enn níggju fólk frá bretska oljufelagnum hava júst verið í Føroyum sum partur av fyrireikingunum til 1. útbjóðing. Ovasta leiðslan í hesum risastóra oljufelagnum hevur givið sínum „Føroyaserfrøðingum" grønt ljós fyri at lata upp fyri komandi leitingini eftir olju og gassi á føroyska landgrunninum.

Og BP Amoco er heldur eingin ársungi um okkara leiðir. Felagið hevur gjørt kanningar á Føroyaøkinum í umleið 10 ár og hava tær kostað helst væl omanfyri tær 100 mill. kr. Hvussu nógvar hundrað milliónir kr. felagið hevur lagt í sínar kanningar á Føroya økinum vil Brian Mitchener ikki siga, bert at talan er um stórar upphæddir.

Og hóast bíðitíðin til 1. útbjóðing hevur verið long, so halda BP fólkini ikki, at hon hevur verið til fánýtis. Tí BP Amoco er nú liðugt við sínar fyrstu kanningar av Føroyaøkinum og fyrireikar í hesi løtu eina umsókn til føroysku myndugleikarnar. Felagið sigur seg vera uppaftur meira áhugað fyri Føroyaøkinum, nú teir eru lidnir við kanningarnar, ið geva eitt nógv betri bílæt av undirgrundini enn tey modell teir hava brúkt higartil.

-Vit hava greitt oljumyndugleikunum frá úrslitinum av okkara kanningum og hvørjar vónir og ynski vit hava til komandi útbjóðing. Vit hava vitjað stovnar, feløg og virki, sum vit koma at hava eitthvørt tilknýti til í sambandi við útbjóðingina sigur Brian Mitchener, sum heldur føroyskir myndugleikar hava dugað væl at lagt til rættis komandi útbjóðing. Hann er eisini nøgdur við treytirnar fyri útbjóðingini, sum hann heldur fara at koma føroyska samfelagnum væl við. Hóast treytirnar eru harðari enn fyri bretska økið, so ber heilt væl til at liva við teimum.

### Nógva vitan

BP Amoco, sum rekur tey bæði oljufeltini vestan fyri Hetland, Foinaven og Schiehallion, ið liggja stutt frá markinum, metir seg hava góð kort á hondini til komandi útbjóðing, tí teir hava so nógvar royndir og vitan frá einum oljuøki, sum helst kemur at líkjast tí føroyska nógv.

Tað er als eingin ivi um longur, at oljuførandi løgini bretsku megin markið eisini eru til steðar inni á føroyskum øki. -Vit meta møguleikan fyri at finna olju við Føroyar at vera góðan, og at feltini, sum fara at verða funnin, helst fara at verða á stødd við Foinaven og Schiehallion. Teir hava ikki serliga góðar vónir um at finna elefantar, tvs. risastór oljufelt í tí økinum, sum er við í 1. útbjóðing. Men hvat kann goyma seg undir basaltinum tess longur vestur man kemur er so ein annar spurningur.

Hóast BP Amoco metir útbodna økið kunna goyma kanska einar 3-5 milliardir tunnur av olju, sum ikki er nøkur stór nøgd, so kann hetta kortini verða byrjanin til nakað størri. Tað fer so at krevja betri tøkni til at síggja, hvat er undir tjúkku basaltfláunum tess longur vestur vit koma. Men mest umráðandi er skjótast til ber at fáa staðfest, at oljufelt eru á føroyskum øki. Tá tað er gjørt, so verður støðan ein heilt onnur.

Hóast Brian Mitchener er bjartskygdur heldur hann, at vit eiga eisini at vera varin og ikki yvirmeta møguleikarnar at gera stór fund, tí økið, sum í løtuni serstakur áhugi er fyri tætt upp at markinum, er ikki so øgiliga stórt.

Tí vil hann heldur ikki siga, hvussu nógv oljufeløg ella bólkar pláss er fyri har. Mett verður, at tað helst verða einir seks bólkar, sum fara at vera við í 1. útbjóðing.

BP Amoco prioriterar Føroyaøkið rættiliga høgt í heimshøpi. Felagið, sum sigur seg hava eina sokallaða „successrate" uppá 1 av 2 tvs. at tað finnur olju fyri eina boring út av teimum, ætlar sær eisini at røkka hesum úrsliti við Føroyar.

Brian Mitchener váttar annars, at teir eru áhugaðir í fleiri prospektum á Føroyaøkinum, tvs. avmarkaðum økjum í undirgrundini, sum vísa seg at kunna goyma olju.

### Einsamallir

BP Amoco ætlar sær ikki at taka onnur oljufeløg við í umsóknina. -Vit vilja vera BP Amoco 100% við Føroyar, tí økið, sum er boðið út, er ikki so stórt, umleið 6000 kvkm. Økini, sum felagið hevur stóran áhuga fyri, eru sera meinlík oljufeltunum Foinaven og Schiehallion, og so væl ber til at lesa undirgrundina av, at teir longu nú kunnu byrja at tilrættaleggja komandi brunnarnar við Føroyar við tí í hyggju at byrja at bora í triðja ársfjórðingi næsta ár. Teimum nýtist so í hvussu er eitt ár til at tilrættaleggja brunnar á djúpum vatni.

BP Amoco hevur longu eyguni eftir fleiri møguligum boripallum at arbeiða í føroyska økinum. Tá og um olja verður funnin, so verða helst somu loysnir brúktar við Føroyar sum á verandi feltum á breskum øki. Tvs. at talan verður at brúka FPSO-skip av sama slag sum tey, ið liggja á Foinaven og Schiehallion-feltunum. Um tað eydnast at finna olju við Føroyar skjótt hesi næstu árini so rokna teir við framleiðslu ár 2007. Hjá BP Amoco rokna teir við, at framtíðar oljuprísurin fer at liggja um einar 18 dollarar. Fyri at tað skal loysa seg at útvinna olju á føroyska økinum er neyðugt við einum prísi uppá 11 dollarar, so við verandi prísi uppá 25 til 30 dollarar kann føroysk oljuframleiðsla gerast ein sera góð forrætning fyri oljufeløg og føroyska statin.

BP Amoco hevur eisini stórar ætlanir á bretkum øki. Eitt stórt arbeiðsprogramm er gjørt fyri økini nær verandi feltunum, og har fara at verða boraðir fleiri brunnar komandi árini. Møgulig nýggj felt vilja tá verða bundin uppí verandi feltini á Atlantsmótinum. Eisini risaoljufelagið Clair er aftur á skránni. Tað varð funnið í 1978, men higartil hevur tað verið torført at fáa oljuna upp. Nú verður so farið undir eina ætlan við tí fyri eygað at fara undir framleiðsluni einaferð í næstu framtíð.

### Lata upp skrivstovu 18. apríl

BP Amoco letur upp skrivstovu í Havn 18. apríl. Felagið hevur gjørt sáttmála við Kristian á Neystabø um leigu av einum parti av ognini á Skansavegnum nær bygninginum hjá Tryggingarfelagnum á Kongabrúnni. Tvey fólk vera á skrivstovuni í byrjanini, umboðsmaðurin Hjarnar Djurhuus og ein skrivari. Annars rokna BP Amocofólk við at vitja javnan á skrivstovuni. Tá skrivstovan verður tikin í brúk alment kemur hjálparskipið, Grampian Frontier, sum hevur fast arbeiði kring Foinaven feltið, til Føroya fyri at skifta manning út.

Ætlanin er at bjóða bæði løgmanni, oljumálaráðharranum og øðrum almennum umboðum til hátíðarhaldið í apríl. Tá fara bretar so eisini at avdúka, hvat brunnurin nevndur Conival, stutt frá føroyska markinum, goymir. Tað eru fimm ár síðani, at BP boraði Conival og tá bóru bretsk bløð tíðindini um, at BP hevði gjørt eitt stóra fund skamt frá føroyska markinum, eitt fund, sum møguliga eisini gekk inn á føroyska økið.




Í býin - altíð eitt stað at fara

Streymoy

NÁTT-BUSSURIN
v/ Øssur Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

SKAR‹HAMAR´S BUSSKOYRING
v/ He›in Skar›hamar, Sleipnisgøta 13. B, FO–100 Tórshavn
TAXA
MINI BUSS TIL 10 FER‹ANDI
288888
FR • VISA • EUROCARD • MASTERCARD • JCBCARD

fk Matseðilin
Hósdagin 30. mars: Karbonadir
Fríggjadagin 31. mars: Nakkakotelettir
Leygardagin 1. apríl: Oksasteik
Mánadagin 3. apríl: Gjørd hara
Týsdagin 4. apríl: Stoktan fisk
Mikudagin 5. apríl: Stokt flesk
Kostnaður 30,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

Su›uroy

DANSUR VIÐ KLAUS & SERVANTS
í høllini í Vági fríggjakvøldið 31/3
Kostnaður kr. 130,-

1905 VB Vágs Bóltfelag
Sosialurin - 311820

Nor›oyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Dansur verður leygarkvøldið 1. apríl
"MARTIN" vendir plátum
Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY
Sosialurin - 311820

Kaggin
Fríggjakvøldið 31/3 og leygarkvøldið 1/4
spæla
HJARNAR
Køkurin er opin fríggja- og leygarkvøld kl. 18.00-22.00
Kaggin Kaggin Kaggin
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

Long drinks Café
CLEOPATRA
Við gongugøtuna
Opið er:
Mán.– Hós. kl. 19.00 – 23.30
Fríggjadag kl. 17.00 – 03.30
Leygardag kl. 19.00 – 03.30
Sunnudag kl. 17.00 – 23.30

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra - so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO 311234

Streymoy/Eysturoy

HITT KONSERT OG DANSUR


Fríggjakvøldið 31. mars í Badmintonhøllini í Tórshavn
Leygarkvøldið 1. apríl í Ítróttarhøllini í Runavík
Tey kendu hittini hjá Moirae, Terja og Føstufressum, Frændum, Eyðun Nolsøe Band og Eyðun & Terja verða spæld.
Kl. 23.00-03.45 • Kr. 100,-
Sosialurin - 311820

Lesið sosialin sosialin sosialin

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650

HK HAVNAR KLUBBI Stovnaður 1799
KLUBBADANSUR
Leygarkvøldið spælir
COCKTAIL v/manning úr Bacon
Sosialurin - 311820

CAFÉ NATÚR
* * *
Staðið har vit hittast
***

Halt sosialin


Vilja tygum vi› í

*Í b‡in* - hvønn hósdag

Ynskja tygum at l‡sa í teiginum ***í b‡in***, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur